# Býráðið

**Dagfesting:** 27.11.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| Málsyvirlit | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 53/25 | 25/00238-1 | Vælkomstpakki - uppskot um avtøku av tilboðnum |
| 54/25 | 25/00050-2 | Bygdasavn - Fyrireiking, greining og menning. |
| 55/25 | 25/00565-1 | Eykajáttan november-desember 2025 |
| 56/25 | 25/00318-11 | Fíggjarætlan fyri 2026 |
| 57/25 | 25/00561-3 | Tilmæli um setan av tekniskum leiðara |
| 58/25 | 23/00247-11 | Møgulig semja millum Faroe Agency og Fuglafjarðar kommunu |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til afgørelse**

## 53/25
## 25/00238-1 Vælkomstpakki - uppskot um avtøku av tilboðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.04.2025 | 11/25 |
| 2 Býráðið | 01.05.2025 | 19/25 |
| 3 Sosiala nevnd | | |
| 4 Sosiala nevnd | 21.08.2025 | 24/25 |
| 5 Býráðið | 27.11.2025 | 53/25 |

2

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd og býráðið |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **7. apríl 2025 – sosiala nevnd**<br>1. oktober 2015 bleiv avgerð tikin um at lata eina vælkomstgávu til nýggjar borgarar, sum flyta til Fuglafjarðar kommunu. Innihaldið í vælkomstpakkanum var: ein taska, pennur, filmur, blokkur, ein pjesa (kommunan í tølum) og ein heilsan frá borgarstjóranum. Umframt vælkomstgávuna, læt Fuglafjarðar kommuna tríggjar teir fyrstu mánaðirnar ókeypis barnaansing, til hvørt barn sum ansað var á dagstovnunum hjá kommununi.<br><br>Avgerðin um vælkomstpakkan var úrslitið av einari verkætlan sum kommunan gjørdi saman við Sendistovuni. Spurdómurin í verkætlanini var «Hvussu branda vit Fuglafjørð». «Fuglafjørður – har familjurnar trívast»<br><br>Tað er óvist, nær vit eru givin við at veita tann fysiska gávupakkan, men avgerð er ongantíð tikin um at avtakað skipanina, sum enn í dag, fáa tilflytarar við børnum á dagstovni fríðan dagstovn frá Fuglafjarðar kommunu í tríggjar mðr.<br><br>Tað er ymiskt frá ár til ár, hvussu nógv hendan skipanin kostar kommununi, tí tað avhongur av, hvussu nógv flyta til kommununa sum hava børn í aldrinum 0 – 8 ár sum ganga á dagstovni ella frítíðarskúla. Seinastu fimm roknskaparárini hevur miðal útreiðslan til gávupakkan verið góðar 140.000 kr. um árið. |

| Ár | Kostnaður |
|---|---|
| Januar – desember 2020 | 115.775,00 |
| Januar – desember 2021 | 168.550,00 |
| Januar – desember 2022 | 141.200,00 |
| Januar – desember 2023 | 134.850,00 |

| | |
|---|---|
| Januar – desember 2024 | 140.400,00 |
| Januar – 1. apríl 2025 | 41.925,00 |

Skipanin bleiv sett í verk uttan nakra útgreinaða vegleiðing annað enn, at tilflytarar sum hava børn á dagstovni skulu hava ókeypis dagstovn í tríggjar mðr. Hettar gevur nøkur ivamál. Skulu borgarar, sum koma frá bygdini, men sum hava búð í aðrari kommunu í 1 ár og so flyta aftur, hava frádráttin? Um tú hevur haft barn á stovni, men tekur barnið úr tilboðnum og flytur kommunu, og eftir stutta tíð angrar hettar og flytur aftur, skalt tú so hava ókeypis stovnspláss í tríggjar mánaðir?

Her eru nøkur av teimum temaunum sum eisini hava verið uppi og vent og spurningar sum eru settir í mun til skipanina.

- Hvussu skilgreina vit, hvør er tilflytari – sí frágreiðing omanfyri
- Hví skulu skattaborgarar sum hava goldið skatt alla tíðina gjalda fyri, at tilflytarar, som ongan skatt hava goldið, skulu hava ókeypis stovnspláss, meðan skattaborgarin sum hevur goldið skatt alla tíðina, skal gjalda fyri stovnsplássi?

Tað er ongin kunning á heimasíðuni hjá kommununi um. At tilflytarar fáa fríðan dagstovn fyrstu 3. mánaðirnar, tí er ikki sannlíkt, at tey, sum eru flutt hertil, hava valt Fuglafjørð grunda á gávupakkan.

Borgarstjórin hevur skotið upp, at vælkomstpakkin verður strikaður. Út yvir tey argumentini sum eru lýst Hann leggur eisini dent á, at tað er ein eyka administrativ uppgáva at umsita skipanina.

**1. mai 2025, Býráðið**
Sosiala nevnd hevur á fundi tann 7. apríl viðgjørt málið, og semja var um at senda málið víðari til býráðið við uppskotið um at strika skipanina um fríðan dagstovn í tríggjar mánaðir til børn hjá tilflytarum.

**5. mai 2025, Sosiala nevnd**
Málið bleiv ikki viðgjørt í býráðnum, tí tað áðrenn fundin í Býráðnum bleiv greitt, at tað var ein feilur í upplýsingunum um, hvat skipanin kostar kommununi. Máli bleiv tí beint aftur til sosialu nevnd til nýggja viðgerð.

**21. august 2025**
Málið verður lagt fyri sosialu nevnd av nýggjum, nú við røttum tølum.

| **Ár** | **Kostnaður** |
|---|---|
| Januar – desember 2022 | 9.700,00 |
| Januar – desember 2023 | 10.750,00 |
| Januar – desember 2024 | 26.150,00 |
| Januar – 1. juli 2025 | 12.150,00 |

| | |
|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Borgarstjórin ynskir at Sosiala nevnd tekur máli til viðgerðar og tekur støðu til, um tilboð um vælkomstpakka til tilflitarar skal avtakast. |

| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
|---|---|---|---|
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | X |
| | Umsitingarligar | | X |
| Tilmæli | **7. apríl 2025 – Sosiala nevnd**<br>Mælt verður til, at sosiala nevnd tekur støðu til, um uppskotið um at strika vælkomstpakkan um fríðan dagstovn í tríggjar mánaðir til børn hjá tilflytarum.<br><br>**1. maj 2025 – Býráðið**<br>Mælt verður til at býráðið tekur støðu til uppskotið frá sosialu nevnd um at strika skipanina, har tilflytarar frá fríðan dagstovn í trýggjar mánaðir til børn sum ganga á dagstovni.<br><br>**21. august 2025 – Sosiala nevnd**<br>Mælt verður til at sosiala nevnd viðgerð málið enn einaferð og tekur støðu til, um semja enn er um at strika vælkomstpakkan. | | |
| Dagf | 2. apríl 2025, 11. apríl 2025 og 19. August 2025 | | |



**Sosiala nevnd 07. april 2025:**
Semja var um at senda málið víðari til býuráðið við uppskotið um at avtakað skipanina.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið varð beint aftur í Sosialu nevnd.

**Sosiala nevnd 21. august 2025:**
Sosiala nevnd samtykti at senda málið víðari til býráðið við uppskotið um at avtakað skipanina.

**Býráðið 27. november 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá sosiaku nevnd um at avtakat skipanina.

**54/25**
**25/00050-2 Bygdasavn - Fyrireiking, greining og menning.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.02.2025 | 3/25 |
| 2 Mentamálanevndin | 04.11.2025 | 50/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 70/25 |
| 4 Býráðið | 27.11.2025 | 54/25 |



**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Mentamálanevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í eina tíð hevur verið tosað um, at Fuglafjarðar kommuna átti at havt eitt bygdasavn. Nýsetta býráðið hevur somuleiðis bygdasavn í samgonguskjalinum. Mentanardeildin hevur í stillum, spurt seg fyri á Tjóðsavn Føroya, um hvussu vit koma í gongd við eitt bygdasavn. Starvsfólk á mentanardeildini hevur verið í samband við starvsfólk á tjóðsavninum og hevur somuleiðis samskift við Mentamálaráðið. Síðsta freist til at søkja um bygdasavn er 15.des. 2025. Tá skal umsókn við frágreiðing um fyrireiking, greining og menning latast inn.<br>Í samráð við Tjóðsavnið, eru vit komin ásamt um, at best er at byrja við upplæring viðvíkjandi skráseting. Á tann hátt fáa vit spakuliga sett hol á ætlanina samstundis sum vit læra at skráseta. Ì hesum sambandi hevur mentanardeildin tosað við fakpersón, sum hevur játtað at geva 5-6 fólkum frá Fuglafjarðar kommunu, eina upplæring í teirra skrásetanarskipan. Tann 15. jan. 2025 var upplæring.<br>Ein slík skrásetingarskipan kostar, men við at gerast eitt formelt bygdasavn, vónandi seinri í árinum, verður, sum eg havi skilt tað, sæð burtur frá kostnaðinum av skipanini.<br>Fuglafjarðar kommuna hevur áður samstarva við Tjóðsavnið, eitt nú á Mentanardøgum í sept. 2018, tá serframsýning frá útgrevsturinum heimi í Oyruni, við grípum sum tá vóru funnir av Sverra Dahl í 1958, vóru sýndir.<br>Slíkir gripir eiga heima á Tjóðsavninum, men mangt annað kundi verið áhugavert at sýnt fram á einum bygdasavni.<br>Nakað av peningi er sett av á RS 534, til at byrja fyrireiking. (50tkr)<br><br>Fyri at koma rætt í gongd, hava vit vent tankanum um at at heita á persón, at hjálpa okkum at fáa gongd á skrásetingina. Ein møguleiki kundi verið at fingið hana at hjálpt okkum á sama hátt |

<table>
<tr><td></td><td colspan="3">sum vit brúktu søguáhugaðan Fuglfirðing, at skráseta skjøl frá skúlanum og gomlu skjølini frá kommununi. Her kundu vit brúkt líknandi avtalu, sum vit brúktu við viðkomandi.<br><br>Samstarvspartar kundu verið Fuglafjarðar Fornminnisfelag, men eisini finnast aðrir góðir persónar við tilknýti og áhuga fyri økinum.<br>Tað ræður um at inkludera og fáa fólk, sum hava áhuga fyri økinum at hjálpa til og samstarva um at leggja fyrstu steinarnar til eitt slíkt savn, fyri at koma væl í gongd.<br>Í fyrstu atløgu síggja vit fyri okkum, at fólk kunnu koma við teirra lutum og fáa teir skrásettir í skipanini, men taka lutinar heim við aftur. Seinri má høli finnast til at goyma lutir.<br>Fyrstu tíðina kundi verið skipað fyri rullandi framsýningum.<br><br>12-11-2025<br>Í samband við umsókn til Tjóðsavnið, um at gerast góðkent bygdasavn, verður við hesum lagt uppskot til viðtøkur til góðkenningar í mentamálanevndini.</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">FFK hevur onga goymslu. Eitt Nú hevur mentanardeildin skipað eina rúgvu av spennandi og mennandi tiltøkum, men hesi verða ikki skrásett nakrastaðni og onki høli ella goymsla er tøk.<br>Eisini hevur Fuglafjarðar fornminnismelag arbeitt við fornminnum og hava við bæði Mortanshús, Húsini hjá Skála umframt Bátasvnið og Ribarhús.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Avtala sum var gjørd við persón: jrn 20/00021<br><br>• Avtala varð gjørd við persón í 2020, um arkivering av gomlum skjølum. Til hetta arbeiði, var sáttmálin millum Starvsfelagið og KAF brúktur, stig 25, tímaløn 229,71.<br>• Sami leistur kundi verið brúktur, við eini avmerking á 2 dg um vikuna í 20 vikur, og vildi tað verið at samanborið við eina mdr.løn á 42.266,64. Í alt 84.533,28</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Heitt verður á nevndina at taka undir við at mentanardeildin spakuliga fer í gongd við at fyrireika, greina og menna eitt bygdasavn. Eisini verður heitt á nevndina um at viðgerða møguleikan at fáa eina avtalu gjørda við persón, sum kundi fingið gongd á skrásetingina og gjørt</td></tr>
</table>

6

| | |
|---|---|
| | samstarvsavtalu við viðkomandi, samsvarandi omanfyristandandi uppskoti.<br><br>**12.11.2025**<br>Mælt verður til at nevndin ger rættingar til tilmælið. |
| Dagf | 13.01.2025 |

**Mentamálanevndin 04. februar 2025:**

Ein samd nevnd tekur undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 04. november 2025:**

Nevndin tekur undir við málinum og sendur málið víðari til fíggjarnevnd og býráðið

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við at umsókn verður send um at stovna bygdasavn og 85 tkr. verða settar av til endamálið í 2026.

**Býráðið 27. november 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá mentamála- og fíggjarnevndini.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

## 55/25
## 25/00565-1 Eykajáttan november-desember 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | | |
| 2 Sosiala nevnd | 17.11.2025 | 37/25 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 17.11.2025 | 32/25 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.11.2025 | 52/25 |
| 5 Orku og umhvørvisnevndin | 17.11.2025 | 17/25 |
| 6 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 68/25 |
| 7 Býráðið | 27.11.2025 | 55/25 |

### Tilráðing

| | |
|---|---|
| Til viðgerðar í | Føstu nevndunum og býráðnum |
| Stutt lýsing av málinum | Nú komið er út í november mánaða kann staðfestast, at tørvur er á eini seinastu dagføring av fíggjarætlanini fyri 2025.<br><br>Málið hevur verið í føstu nevndunum sum koma við hesum umbønum um meirjáttanir: |



| Nr. | Rakstrarstað | Kr. |
|---|---|---|
| RS 230 | Kommunal tannrøkt | 60.000 |
| RS 260 | Vesturstova, eldrarøkt | 151.000 |
| RS 264 | Doktarahúsini | 90.000 |
| RS 265 | Vesturstova (íløgur) | 366.000 |
| RS 285 | Samstarvið, eldrarøkt (Nánd) | 1.617.000 |
| RS 622 | Umhvørvi og Orka | 10.000 |
| RS 636 | Kirkjugarður | 250.000 |
| RS 637 | Kirkjugarður, íløgur | 750.000 |
| RS 650 | Vatnveiting | 150.000 |
| RS 661 | Kloakkir | 300.000 |
| RS 671 | Nýgerð vegir, íløgur | 1.500.000 |
| RS 680 | Gøtuljós | 150.000 |
| RS 710 | Ruskøkið | 250.000 |
| **RS 711** | **Ruskøkið renovatión (íløgur)** | **500.000** |
| RS 714 | Djóra upptøka | 110.000 |
| RS 740 | Moldgoymslan | 800.000 |

| | | |
|---|---|---|
| RS 748 | Talgildu Føroyar | 25.000 |
| RS 752 | Egningarmiðstøðin | 38.000 |
| RS 790 | Bussleiðin | 60.000 |
| RS 792 | Kunningarstovan | 170.000 |
| **Íalt** | **Meirjáttan** | **7.347.000** |

Útreiðsluneutral fígging av hesi meirjáttan kann finnast á hesum

| | | |
|---|---|---|
| RS 620 | Fríðøkir, fríðkan av kommununi | 200.000 |
| **RS 625** | **Fríøkir og frístaðir (íløgur)** | **400.000** |
| RS 633 | Útstykking á Kambsdali | 200.000 |
| RS 651 | Vatnveiting, íløgur | 400.000 |
| RS 653 | Vatneiting Hellurnar | 800.000 |
| **RS 670** | **Vegir** | **800.000** |
| RS 673 | Gongubreyt Kambsdal | 400.000 |
| **RS 681** | **Gøtuljós íløgur** | **600.000** |
| **Íalt** | **Minnijáttan** | **3.800 tkr.** |

Við hesum er tørvurin á meirjáttan 7,3 mió. kr. har 3,8 mió. kr. kunnu fíggjast útreiðsluneutralt meðan tørvur er á eyka 3,547 mió. kr. av nýggjum peningi.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Tørvur er á eykajáttan á nøkrum rakstrarstøðum. Sambært kommunustýrislógini skal fíggjarnevndin koma við uppskoti, sum skal viðgerast 2. ferðir á býráðsfundi við í minstalagi 14 daga millumbili. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt**<br>Kommunustýrislógin og kommunustýriskipanin fyri Fuglafjarðar kommunu.<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>Eykajáttan øki 4 og 5<br>Umbøn um eykajáttan - øki 2 og 3<br>• Rakstur til dato við fíggjarætlan 2025 | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mælt verður til at nevndirnar taka støðu til eykajáttan november-desember 2025. | | |
| Dagf | 17.11.2025 | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Sosiala nevnd 17. november 2025:**
Sosiala nevnd samtykti at biða býráðið um eykajáttan á øki 2 svarandi til kr. 2.183.000

**Vinnu- og havnanevndin 17. november 2025:**
Vinnu- og havnanevndin mælir til, at tað samanlagt verða givnar 1.453 tkr., sum eykajáttan á øki 7, sambært yvirlitinum í málslýsingini.

**Tekniska nevnd 17. november 2025:**
Tekniska nevnd mælir til, at samanlagt verða givnar 3.110 tkr. í eykajáttan sambært yvirlitinum í málslýsingini. Í minsta lagi kunnu 2.000 tkr. á tekniska økinum fíggja eykajáttanina og kannast skal um peningur verður tøkur á øðrum kontum í 2025.

**Orku og umhvørvisnevndin 17. november 2025:**
Meirilutin í orku- og umhvørvisnevndini mælir til at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og Vinnu- og havnanevndini. Ørvar Jacobsen mælir til at játtanin til RS 673 Gongubreytir Kambsdal verður flutt til 2026. 

**Fíggjarnevndin 20. november 2025:**
Fíggjarnevndin mælir til at 500 tkr. verða tiknar av RS 160: Býráðshúsið (íløgur)(og 500 tkr. verða fluttar yvir um ár), so samlaði tørvurin á nýggjari játtan verður 3,047 mió. kr. Harafturat mælir fíggjarnevndin til at 250 tkr. av somu játtan verða nýttár, at betra um skrivstovuviðurskiftini í fyrisitingini.

Fíggjarnevndin hevur ynski um at býráðið í góðari tíð verður betri kunnnað um fíggjarviðurskiftini hjá Nánd.

Fíggjarnevndin tekur undir við eykajáttanini og mælir til, at peningur verður settur av til RS 673 gongubreyt Kambsdal.

Mælt verður til at tær 3,047 mió. kr. verða fíggjaðar av meirinntøku av A og B-skatti.

**Býráðið 27. november 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini.

## 56/25
## 25/00318-11 Fíggjarætlan fyri 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 26.10.2025 | 66/25 |
| 2 Býráðið | 30.10.2025 | 49/25 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.11.2025 | 47/25 |
| 4 Tekniska nevnd | 17.11.2025 | 53/25 |
| 5 Vinnu- og havnanevndin | 17.11.2025 | 33/25 |
| 6 Orku og umhvørvisnevndin | 17.11.2025 | 16/25 |
| 7 Sosiala nevnd | 17.11.2025 | 36/25 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.11.2025 | 67/25 |
| 9 Býráðið | 27.11.2025 | 56/25 |

11

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og Býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Býráðið hevur í døgunum 23. og 24 oktober arbeitt við, at raðfesta hvussu peningurin skal nýtast í 2026 út frá teimum kørmum, sum vórðu samtyktir 25.09.2025 har rakstur áðrenn rentur og avsrkivingar varð ásettur til 90,5 mió. kr. og íløgurnar til 50 mió. kr.<br><br>Inntøkurnar við óbroyttum skattprosent 21,25% og óbroyttum frádráttum væntast at vera 129 mió. kr., samansettar av:<br>• Inntøkuskatti 88,5 mió. kr.<br>• Partafelagsskatti 17 mió. kr.<br>• Skattur av kapitaleftirlønum 21,2 mió kr<br>• DIS/FAS, veiðu- og tøkugjøld 2,7 mió kr.<br><br>Hetta merkir at fíggjarætlanin komandi ár hevur eitt gjaldførishall áðrenn rentur og avskrivingar uppá 11,5 mió. kr., sum má fíggjast við lántøku og/ella uppspardum peningi.<br><br>Í **rasktrinum** eru flestu rakstrarstøð framskrivað við umeið 4% á lønarsíðuni. Harafturat eru hesar raðfestingar gjørdar:<br>• <u>Øki 1, kommunal fyrisiting:</u> + 350 tkr. til integratiónsssamskipara og kunningarfólk |

| | |
|---|---|
| | • <u>Øki 3, Børn og ung:</u> +250 tkr. til matarskipan á Barnalund og Stropanum<br>• <u>Øki 5, Mentan- og frítíð</u>: + 30 tkr. til ljóðføri í musikskúlanum, +75 tkr. til starvsfólkahjálp í Piddasahandli, + 150 tkr. til søvn/mentanararv, og + 20 tkr. hitapumpa til bátasavnið.<br>• <u>Øki 6, Teknisk mál</u>: +200 tkr. til fríðkan av kommunalum økjum.<br>• <u>Øki 7, Kommunal virki:</u> +100tkr. til umhvørvisplássið á Kambsdali, +84 tkr. til dagføring av tilbúgvingini og +200 tkr. til ferðavinnuætlan.<br>Á **løgusíðuni** eru hesar raðfestingar gjørdar fyri 2026:<br>• <u>Øki 1, kommunal fyrisiting:</u> +2,5 mió. kr., til miðbýarætlanina, heimasíðu, (skrivstovu) og uppstigingar.<br>• <u>Øki 2, Almanna- og heilsumál:</u> +390 tkr. til barnatannrøktina og vesturstovu.<br>• <u>Øki 3, Børn og ung:</u> +250 tkr. til Kamb og Barnalund.<br>• <u>Øki 4, Undirvísing:</u> +30,3 mió. kr. harav 30 mió. kr. sambært avtalu um umvaling av 64-skúlanum<br>• <u>Øki 5, Mentan- og frítíð</u>: +5,8 mió kr. harav 5,0 mió. kr. til nýtt grasteppi á fóbóltsvøllinim, 600 tkr. til Høllina á Kambsdali og restin til smærri verkætlanir.<br>• <u>Øki 6, Teknisk mál:</u> + 8,55 mió kr. netto, harav 250 tkr. til plantulund á Kambsdali og ábøtur á svimjihilin í Skarðsá, 1,7 mió kr. til kikjugarðin í Fuglafirði, 500 tkr. til vatnveiting, 2,3 mió kr. til reinsiverk á Kambsdali, 1,0 mió. kr. til asfaltering við miðnámsskúlan á Kambsdali o.a og 2,4 mió. kr. til útstykkingar.<br>• <u>Øki 7, Kommunal virki:</u> +12 mió. kr. harav 10 mió. kr. til bryggju, sambært avtalu, 1. mió til íløgur á havnalagnum og 1 mió. kr. til vinnuøkið á Kambsdali.<br><br>**Til fundin í Fíggjarnevndini 20.11.2025**<br>Dagførdar metingasr frá TAKS og fíggjarmálaráðnum siga at inntøkuskatturin við 21,25% í 2026 verður 85,8 mió kr. , 2,7 mió kr. lægri enn upprunaliga mett, meðan inntøkurnar frá forskatting av kapitaleftirlønum og DIS/FAS er 200 tkr lægri enn upprunaliga mett.<br><br>**Til býráðsfundin 27.11.2025**<br>Býráðslimirnir á lista Á, Ólavur Larsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen og Sonni á Horni, eru komnir við tveimum broytingaruppskotum.<br><br><u>Broytingaruppskot 1:</u><br>At lækka skattin við 0,3% niður á 20,95%, sum viðførir eina inntøkulækking á 1,25 mió. kr. Lækkaða inntøkan verður fíggjað við lántøku. |

| | |
|---|---|
| | <u>Broytingaruppskot 2:</u><br>Skotið verður upp at broyta hesar íløguavsetingar. Rakstrarstað 625, Fríøkir og Frístaðir verða hækkað við 500 tkr.,raksrarstað 673, Gongubreyt Kambsdal verður hækkað við 1 mió. kr. og rakstrarstað 671, Nýgerð vegir verður lækkað við 750. kr. Kostnaður av broytingauppskoti 2 er 750 tkr. sum skal fíggjast við lántøku.<br><br>Býráðslimirnir á lista F og lista B, Dávur Juul, Eivin Breiðaskarð, Jóan Pauli Olsen, Eyðun á Lakjuni og Kristian Martin Petersen eru komnir við einum broytingaruppskoti:<br><br><u>Broytingaruppskot 3:</u><br>Skotið verður upp at hækka barnafrádráttin við 500 kr., frá 8.500,- kr. til 9.000,- kr.. Kostnaðurin 201.500 kr. verður fíggjaður við lántøku. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §38 stk. 2. í kommunustýrislógini skal kommunustýrið viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember. |
| Grundarlag | <u>Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt:</u><br>• Kommunustýrislógin og kommunustýrisskipan fyri Fuglafjarðar kommunu<br><u>Møgulig fylgiskjøl:</u><br>• |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | N |
| | Umsitingarligar | n | N |

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Aftaná viðgerðina 23. og 24 oktober er raksturin 94,2 mió kr. ella 3,6 mió kr. hægri enn samtykti rakstrarkarmurin. Í løgurnar eru 60,1 mió. kr. ella 10,1 mió. kr. hægri samtykti karmurin.<br><br>Fíggjarnevndin verður tí biðin um at taka støðu til um rakstur og íløgur skulu skerjast í mun til fyriliggjandi uppskot ella at karmurin skal justerast.<br><br>Harafturat skal fíggjarnevndi taka støðu til, skattaprosent, frádráttir og inntøkumetingarnar annars, áðrenn málið verður sent byráðnum til 1. viðgerð. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | |
|---|---|
| | **Til býráðsfundin 27.11.2025.**<br>Býráðið skala taka støðu til broytingaruppskotini komin til fundin hóskvøldið 27.11.2025 og tilmælið frá fíggjarnevndini 20.11.2025. |
| Dagf | 26.10.2025 |

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2025:**
Fíggjanevndin mælir til at tað verða sett 25 mió. kr. av til skúlaumbyggingina í 2026 og at 5 mió. kr. verða sett av í 2027. Harafturat verða allar nevndirnar bidnar um at spara 150 tkr. í rakstrinum á økjunum 1 til 7. Fíggjarnevndin mælir harafturat til at skattaprosent og frádráttir verða óbroyttir komandi ár.

**Býráðið 30. oktober 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum og sendir málið víðari til aðru viðgerð.



**Mentamálanevndin 04. november 2025:**

Nevndin hevur funnið tær sparingar á øki 4. og 5., sum fíggjarnevndin ásetti nevndunum at spara.

**Vinnu- og havnanevndin 17. november 2025:**
Vinnu- og havnamevndin mælir til at tær 150 tkr. verða tiknar av RS 790, Kunningarstovan, RS 772 Brunaverkið og RS 750 Fuglafjarðar havn, við 50 tkr. hvør. Harafturat verður mælt til at peningur verður settur av til moldgoymsluna, at slætta gomlu goymsluna og at gera vegin.

**Tekniska nevnd 17. november 2025:**

Tekniska nevnd mælir til at tær 150 tkr. verða tiknar av RS 620, Fríðkan av kommununi 50 tkr., RS 660 Kloakkir, 50 tkr., RS 670 Vegir 25 tkr. og RS 690 Bilar og Maskinur 25. tkr.

Harafturat mælir nevndin til at 1 mió. kr. verða settar av at asfaltera Innandalsvegin og 600 tkr. til íløgur í Kirkjugarðin, sambært sáttmála.

**Orku og umhvørvisnevndin 17. november 2025:**
Orku- og umhvørvisnevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og Vinnu- og Havnanevndini.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**<u>Sosiala nevnd 17. november 2025:</u>**
Sosiala nevnd mælir til at játtanin til rakstrarstað 260 verður hækkað við 50.000 og at játtanin til RS 264 skal lækkast við 50.000. Sosiala nevnd metir ikki at tað er møguligt at skerja játtanina á øki 2 við 150.000

Sosiala nevnd mælir til at hækka inntøkuna á RS 310 við 50.000 og á RS 314 við 50.000. Nevndin mælir til at viðlíkahald á Kambi verður hækka við 50.000 og at játtanin til RS 350 verður hækka við 50.000. Játtanin til keyp av vørðum og tænastum á RS 310 verður skorðin við 125.000 og RS 314 verður skorðin við 125.000

**<u>Fíggjarnevndin 20. november 2025:</u>**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá nevndunum.

Harfafturat mælir Fíggjarnevndin til, at seta 85 tkr. RS 560 Fornminnisfelagið, søvn og mentanararvur og 400 tkr. til RS 673 Gongubreyt á Kambsdali, netto 500 tkr. av afturat til moldgoymsluna, 400 tkr. aftturat til sorteringsskúrar á umhvørvisplássinum, 1mió. kr. afturat til kloakkir. Fíggjarnevndin mælir til at lækka íløguútreiðslurnar til 64-skúlan við netto 4 mió. kr. og at taka 50 tkr. av á kontuni til frípláss RS292.

Samlað verður raksturin 93,8 mió kr. og íløgurnar 54,4 mió kr.

**<u>Býráðið 27. november 2025:</u>**
<u>Býráðið atkvøddi fyrst um broytingaruppskot 1:</u>
Ørvar Jcobsen, Jastrid á Dalbø, Ólavur Larsen og Sonni á Horni atkvøddu fyri. Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarða atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

<u>Býráðið atkvøddi síðani um broytingarippskot 2:</u>
Ørvar Jcobsen, Jastrid á Dalbø, Ólavur Larsen og Sonni á Horni atkvøddu fyri. Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarða atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

<u>Býráðið atkvøddi síðani um broytingaruppskot 3:</u>
Býráðið tók einmælt undir við broyingaruppskoti 3.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini frá 20. november 2025, saman við broytingaruppskoti 3. Tilmæli og broytingaruppskotið varð einmælt samtykt.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 23.00

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

20

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen